Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Sólvit E. Nolsø, løgtingsmaður

Svarari: Dennis Holm, landsstýrismaður í fiskivinnu- og samferðslumálum

Evni: Dalstunnilin

Spurningar:

1. Nær í 2025 verður koyrandi í Dalstunlinum?
2. Verða tilhoyrandi arbeiðir sum installatiónir, ljós, asfaltering v.m. eisini liðug í 2025?

Viðmerkingar:

Í fíggjarlógaruppskotinum 2025 stendur, at í ár (2025) skal arbeiðið í Dalstunlinum gerast liðugt.

Tað stendur eisini, at í 2025 verður arbeitt við tekniskum installatiónum, trygdarútgerð, ljósi, asfaltering og at rigga byggipláss, tyrvingarpláss og annað av.

Hátíðarhald var í Dali í november 2023, tá tunnilin var skotin ígjøgnum.

Arbeiðið at gera tunnilin kláran til gjøgnumkoyring gongur, sum skilst, væl. Enn er tó einki fráboðað frá Landsverki ella ráðnum um eina endaliga dagfesting fyri almennari upplating.

Eisini hevði verið áhugavert at frætt um, hvussu gongur við tilhoyrandi uppgávum sum trygd, ljósi og niðurlegging av byggiplássi.

Á Løgtingi, 31. januar 2025

Sólvit E. Nolsø